## Volvo SCC



Volvo SCC (Safety Concept Car), bleiv kosin "Concept Car of the Year", av amerikanska bilblaðnum Automotive News. SCC vann í harðari kapping við aðrar konseptbilar uppá trygd og nýhugsandi tøkni.

*Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S*

## Hyundai í USA



Leiðslan hjá Hyundai í Suðurkorea hevur tikið avgerð um at framleiða Hyundai bilar í USA. Verksmiðjan verður í Alabama. Framleiðslan byrjar í 2005 og verður uppá 300.000 bilar árliga. DaimlerChrysler eiga 10,5 prosent í Hyundai.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Chrysler í Týsklandi



Chrysler Crossfire, ið fyrstu ferð bleiv sýndur fram í Detroit í fjør, skal framleiðast í Týsklandi. Hetta er fyrsti Chrysler, ið verður framleiddur í Týsklandi eftir samanleggingina millum Daimler-Benz og Chrysler.

*Kelda: Motor Magasinet*

# P/F Meinhardt Arge - aircondition service til øll bilmerkir

**Nú aircondition er vorðin alt meira vanlig útgerð í bilunum, er tørvurin á eftirliti og viðlíkahaldi alsamt vaksandi. Á bilasøluni hjá Meinhardt Arge við Oyggjarvegin hava teir nú latið upp eina aircondition deild**



*Tummas Rasmussen og Vagnur Skúvadal, ið hava sertifikat uppá at kunnu gera eftirlit og viðlíkahalda køliskipanir í bilum, koma at taka sær av aircondition tænastuni hjá P/F Meinhardt Arge*

AIRCONDITION

*Magnus Gunnarsson*

Fyrr var ikki vanligt at bilar høvdu aircondition skipan. Aircondition kundi bíleggjast sum eykaútgerð í størri og dýrari bilum og var standard í teimum heilt fínu luksusbilunum. Nú er aircondition vanlig útgerð í smærri og miðalstórum bilum. Onkur heldur, at vit í Føroyum hava ikki brúk fryi aircondition, tað er bert til tey heitu londini. Hetta er ikki heilt rætt, tí hóast vit ikki hava so nógvan hita, hava vit nógva vætu í luftini, sum ger at ringt er at halda døgg burtur frá bilrútunum.

### Eftirlit og viðlíkahald

Aircondition skipanin skal til eftirlit og viðlíkahaldast við jøvnum millumbili. Tað er av alstórum týdningi at skipanin virkar sum hon skal. Til dømis at mongdin av kølievni er tann rætta, at skipanin avfuktar sum hon skal, at innblásingarhitin er tann rætti og ongin leki er at finna. Um skipanin lekur, kann tað ávirka heilsuna hjá teimum, sum brúka bilin, soleiðis at tey fáa høvuðpínu, búkilsku og trupult við at anda.

### Aircondition Service

Bilverkstaðið hjá Meinhardt Arge letur nú upp deild at taka sær av allari tænastu innan køliskipanum í bilum. Teir hava keypt alla ta útgerð sum skal til, og teir mekanikararnir ið skulu gera arbeiði, hava verið á skeiði, og hava teir serfikat uppá at kunna viðlíkahalda og geva ta røttu tænastuna, ið er í samsvar við treytirnar ið bilframleiðarin áleggur, og at rætt verður atborið við burturbeining av CFC gassum. Arbeiðið verður gjørt sambært galdandi umhvørvisreglum.

# Nýggjur Renault Mégane á Paris Motorshow í heyst

**Tá Paris Motorshow letur upp í heyst, verður ein heilt nýggjur Renault Mégane sýndur fram. Talan er um ein bil í Golf- klassanum, ið verður bygdur yvir ein platform, sum Renault og Nissan hava gjørt í felag. Mégane líkist teimum størru Renault Avantime og Vel Matis**



*Nýggjur Renault Mégane verður sýndur fram á Paris Motorshow í heyst*

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Renault Mégane verður ein annarleiðis og smartur bilur, ið skal kappast við bilar sum t.d.VW Golf, Peugeot 307, Toyota Corolla og Honda Civic. Í fyrstu atløgu verður hann gjørdur í útgávum við 3 og 5 hurðum. Bilurin verður bygdur yvir ein felags Renault / Nissan plattform, har koyrieginleikar og komfortur verða á høgum støði. Nógvir motorar verða at velja ímillum. Bensinmotorar frá 98 til 200 hk og dieselmotorar frá 82 til 120 hk.

Fígging og trygging



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**KIA SEPHIA II HATCHBACK 5 HURÐAR**
Árg Grønur, Km Juli.00. 118.000. Kr. 17.500.



**KIA SEPHIA 1,5 SLX**
Árg Feb. 98, Km 37.000. Kr. 78.000.



**KIA SEPHIA 1,5 GTX**
Árg Reyður, Km Aug.99. 108.000. Kr. 26.700.



**DAIHATSU CUORE 1.0 DE LUXE**
Árg Sep.00, Km 7.600. Kr. 96.000.



**DAEWOO NUBIRA 1,6**
Árg Silvur, Km Dec.98. 108.000. Kr. 22.000.



**NISSAN SUNNY COUPE**
Árg Nov. 88, Km 186.000. Kr. 12.000.



**LAND ROVER DISCOVERY 2.5 TURBO DIESEL. VØRUVOGNUR. VIÐ .MVG**
Árg M.blávur, Km Dec.98. 198.000. Kr. 69.800.



**MAZDA 626**
Árg Nov. 88, Kr. 24.000.



**KIA CLARUS 1,8 SLX**
Árg M.blávur, Km Okt.97. 98.000. Kr. 38.000.



**NISSAN PATROL TURBO DIESEL PERSÓNVOGNUR**
Árg Mars. 92, Kr. 89.000.

P/f D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650

LÝSIÐ við

brúktum bilum í Sosialinum




Bassi vitjar á deildum okkara hesar dagar við spennandi gávu og góðgæti til børnini.

**Mánadagin 13. mai**
12.00 - 13.00 Sørvágur
13.30 - 14.30 Miðvágur
15.00 - 16.00 Sandavágur

**Týsdagin 14. mai**
13.30 - 14.30 Skopun
15.00 - 16.00 Sandur

**Mikudagin 15. mai**
11.00 - 12.00 Fuglafjørður
12.30 - 13.30 Gøta

11.00 - 12.00 Strendur
12.30 - 13.30 Skála
14.00 - 16.00 Runavík

**Hósdagin 16. mai**
12.00 - 13.00 Hvalba
14.00 - 16.00 Tvøroyri

10.30 - 11.30 Tinghúsvegur, Tórshavn
11.45 - 12.45 Hornabø, Tórshavn
13.00 - 17.00 Sverrisgøta, Tórshavn

**Fríggjadagin 17. mai**
12.00 - 13.00 Hósvík
13.30 - 14.30 Norðskáli
15.00 - 16.00 Eiði

12.00 - 13.00 Vestmanna
13.30 - 14.30 Kvívík
15.00 - 16.00 Kollafjørður

FØROYA SPARIKASSI

- beinleiðis á bilasøluni